# Hjálpið skótunum at hjálpa næstu vikuna

**- Aftur í ár koma vit at hjálpa tykkum, so at tit kunnu hjálpa okkum við at hjálpa øðrum, sigur Skótahjálpin, sum frá leygardegnum 24. sept. til leygardagin 1. okt. sendir skótar út at ganga hús úr húsi at bjóða seg fram at gera eitt hvørt arbeiði ímóti einari samsýning, sum fólk sjálvi áseta**



Í 2004 arbeiddu skótarnir 133.468 kr inn til skótahjálpina, og takkar Skótahjálpin fyri stuðulin, sum varð latin soleiðis:

50.000 kr til føroyskar sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung, ið hava mist foreldur við deyða.

50.000 kr vóru latnar til hjálpararbeiðið millum børn í Kolumbia.

100.000 kr vóru latnar úr bráneyðhjálpargrunni til Sunami hjálpina gjøgnum Reyða Kross Føroyar

Í ár verður hjálpin eisini býtt út bæði uttanlands og í Føroyum.

Útlendska verkætlanin verður eisini hesaferð í einum menningarlandi. Føroyski trúboðin, Óluva Laksá, sum í mong ár var í Bangladesj, hevur eisini síðani verið knýtt at einum heimi fyri foreldraleysar gentur av Santalfólkinum. Sjálvsagt er tað trupult at vera fátøk, foreldraleys genta í einum landi, sum støðugt verður herjað av ógvusligum áarlopum og yvirfloymi. Uppaftur verri er eisini at vera av einum lítið mettum minnilutafólki av lagstu kastu.

Á barnaheiminum læra genturnar handverk, sum kann hjálpa teimum til betri at lívbjarga sær og sínum. Tað er vón okkara, at føroyska skótahjálpin kann útvega teimum vinnuligar hentleikar, sum tær annars ikki kunnu fáa.

Tað góða við at hjálpa í menningarlondum er, at peningurin røkkur so vælsignað langt. Verkætlanin, sum Skótahjálpin styðjaði í fjør, barnaheim hjá felagsskapinim »Kristin fyri friði í Columbia«, fekk sera væl burtur úr teimum fimmti túsund krónunum. Tey keyptu eitt grundstykki upp á 2000 fermetrar. Harvið kunnu tey víðka barnaheimið í San Vinsente við eini tiltrongdari dreingjadeild við plássi til 42 dreingir. Harumframt gjørdi stuðulin tað møguligt, at øll tey 300 børnini, sum longu eru knýtt at barnaheiminum kundu fáa eina jólagávu í fjør.

Barnadeildin á Landssjúkrahúsinum flytir til heystar í nýggj hølir. Har verður meira rúmsát og betri umstøður at gera ambulantar barnna kanningar. Ì hesum sambandi verður umframt eina spælistovu inni á deildini, eisini gjørt eitt kombinerað bíðirúm/spælirúm til ambulantar sjúklingar.

Skótahjálpin hevur í ár valt at stuðla barnadeildini við útgerð til spælistovurnar. Barnadeildin fer at nýta upphæddina til størri lutir so sum stóran sjónvarpsskíggja við dvd, teldu og playstation og tilhoyrandi teknifilmum, playstation spølum.

Á barnadeildini verða umleið 1.500 børn innløgd hvørt ár og umleið 1.000 børn fáa ambulanta viðgerð.

Tað eru sostatt nógv børn í Føroyum, sum fáa gleði av hesari gávu.

Barnadeildin er vald út til at verða ein av deildinum á Landssjúkrahúsinum, sum skal royndar koyra tað nýggju talgildu sjúklingajournalskipanina.

Allar skótasamskipanir eru við í skótahjálpini. Tey 21 árini, Skótahjálpin hevur virkað, hevur hon savnað saman og býtt út 2.502.290 kr.

Ì ár fer skótahjálpin at seta á stovn ein hjálpargrunn, sum skal stuðla skótabólkum at virka fyri at rørslutarnað og onnur, sum ikki hava fullan førleika, fáa betri møguleikar at verða við í skótarørsluni.

- Um tú vilt tryggja tær, at skótarnir leggja leiðina framvið hjá tær, so tú kanst hjálpa okkum við at hjálpa øðrum so eru hesi at venda tær til onkran niðanfyri, sigur Skótahjálpin.

**1 Tórshavn:**
Astrid Joensen 227121
**2 Tórshavn:**
Arne D. Madsen 511595
**3 Tórshavn:**
Hildur Arge 219418
**4 Tórshavn:**
Óle Valle 519471

**5 Fuglafjørður:**
Thomas Lambastein 444658

**6 Klaksvík:**
Sigrund Juul Samuelsen 455137

**7 Klaksvík:**
Maria Olsen 282171

**8 Argir:**
Rúna Thomasen 211614

**9 Kvívík:**
Annu Vang 421600

**10 Hvalvík:**
Walther Thomasen 422376

**11 Oyri:**
David Reinert Hansen 422158

**12 Glyvrar:**
Johan Elkjær Hansen 228283

**13 Kallsoy:**
Jona í Lon 456622

**14 Leirvík:**
Jan Dam Vang 443040

**15 Miðvágur:**
Herfríð Niclasen 333139

**16 Kollafjørð:**
Marin Joensen 421398

**17 Vágur:**
Narita í Lágabø 374865

**18 Húsavík:**
Sigrid Petersen 361930

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 38, 2005
www.kaupthing.fo

# Rentuhækking í USA

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku varð sjóneykan sett á amerikanska tjóðbankan, Fed. Ein partur av fíggjarmarknaðinum væntaði, at oyðileggingarnar eftir ódnina Katrinu kanska fingu Fed at steðga við rentuhækkingunum. Men so varð ikki. Fed hevur hækkað stuttu rentuna við 0,25% á hvørjum fundi síðan juni 2004, og nú er hon 3,75%. Í tíðindaskrivinum, sum kom eftir rentufundin, metti Fed, at ávirkanin av ódnini ikki fer at vera varandi. Fed legði í staðin dent á, at høgu oljuprísirnir so við og við kunnu elva til størri prísvøkstur á øðrum vørum. Hetta bendir á, at rentuhækkingarnar í USA fara at halda fram í minsta lagi nakrar mánaðir aftrat. Evropiski miðbankin er í eini heilt aðrari støðu, við lágum búskapar- og prísvøkstri, og tí fara amerikonsku rentuhækkingarnar ikki at sláa ígjøgnum til Evropa enn.

## Lágar rentur

Danska 10-ára rentan var eitt skifti í farnu viku niðri á 2,97%. Harvið setti hon nýtt met enn einaferð. Síðan er hon hækkað eitt sindur aftur, og liggur nú á 3,07%. Útlit eru fyri, at hon fer at sveiggja millum 2,95% og 3,10% hesa vikuna.

## Rita ávirkaði partabrøv

Farnu vikuna vóru tað mest veðurtíðindi úr meksikanska flógvanum, ið ávirkaðu partabrøvini. Eftir herviligu ódnina Katrinu, ið legði fleiri oljureinsiverk lamin, varð óttað, at eisini Rita fór herja oljuídnaðin. Tískil stóðu partabrøv seg sum heild vánaligt. Eftir at Rita gjørdist mildari enn væntað, bleiv jaligari á partabrævamarknaðunum og mánamorgunin hækkaðu partabrøvini sum heild væl. Tíðarskeiðið við ódnum í meksikanska flógvanum er ikki av enn og tí kann væntast, at ódnir fara at seta dám á næsta mánaðin, til ódnartíðarskeiðið er av.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður merkt av álitistølum fyri september, bæði úr USA og Evropa. Ódnin Katrina leggur eitt ok á amerikonsku tølini, og haraftrat er óvíst, júst hvussu nógva ávirkan hon hevur. Tí kann væntast, at hesi álitistøl kunnu elva til røring hesa vikuna. Framhaldandi kann væntast, at oljuprísgongdin verður avgerandi fyri gongdina á virðisbrævamarknaðunum.







**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 619,75 | 1,7% |
| JPY | 5,51 | 0,6% |
| GBP | 1.100,35 | -0,2% |
| NOK | 95,61 | -0,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,15 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 177,07 | 0,4% |
| Norrøn Partabrøv | 100,91 | -0,5% |
| Altjóða Vøkstur | 67,19 | -0,3% |

Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.